ÚT AT KOYRA

Audi Steppenwolf

Audi Steppenwolf er ein conceptbilur, sum er bygdur yvir sama plattform sum Audi A3 og TT, men vi› størri sporvídd og fríhædd. Hann hevur ein 3,2 litur V6 motor vi› 225 hk, Quattro-transmissión, Haldex-differentiali og elektroniskari sperru.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Starakassar í Århus



Á fleiri vegamótum á Århus Ringvej eru so-kalla›ir “Starakassar” settir upp til brúk eftir árskifti›. Spolar eru lagdir í vegin sum aktivera eitt fototól, sum avmyndar bilar sum koyra yvir reytt ljós, ella koyra ov skjótt. Bøturnar eru frá 1000 kr. og uppeftir.

Kelda: FDM / Motor

Nissan X-Trail

Nissan X-Trail er ein frítí›arbilur, sum skal kappast í SUV-klassanum, har kappingarneytarnir eru t.d. Audi All-road Quattro og BMW X5. X-Trail fær ein n‡ggjan 2.0 litur aluminiumsmotor vi› 6 trins elektroniskum gearkassa.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Peugeot 206 CC
– cabriolet og heilársbilur

BILAR
Magnus Gunnarsson

Peugeot 206 CC. Bókstavirnir CC standa fyri Coup de Coeur, sum merkir – hjartans útvaldi – á fronskum, ella Coupé Cabriolet, sum bilurin í roynd og veru er, tí taki› kann uttan truplulleikar leggjast ni›ur í vi›førisrúmi›.

2+2 bilur

Peugeot 206 CC er ein 2+2 bilur, ta› vil siga at tvey fólk sita væl framman, me›an baksetrini eru at rokna sum barnasetur. Á bilum, sum hava sjálvberandi karossarí, er taki› vi› til at halda bilinum saman. Tí er 206 CC væl styrktur undir dúrkinum og millum kabinuna og vi›førisrúmi›, eins og stálrør eru í rútarammuni til forrútin, so hann tolir har›an stoyt, um bilurin skuldi bólta runt. Aftan eru eisini rør til sama endamál.

Hvør sín gearkassa

Hóast karossarí› er væl styrkt, eru munandi minni ristingar at merkja tá taki› er á bilinum. Taki› er lætt at leggja saman, vi› at loysa tvey handtøk, og tr‡sta á ein knøtt millum setrini. Hetta tekur eini 25 til 30 sekund. Tá taki› er lagt saman í vi›førisrúminum, er líti› og onki pláss eftir til vi›føri›. Peugeot 206 CC er ein sportsligur bilur, men ikki ein beinlei›is sportbilur, hóast hann sær solei›is út. Tvær motorstøddir eru at velja ímillum, ein 1,6 litur vi› 110 hk, i› brúkar dekkstødd 185/55-15, men hin er ein 2,0 litur vi› 138 hk, vi› dekkstødd 205/45-16 á alufelgum. Eisini hava teir hvør sín gearkassa.

Smartur bilur

Peugeot 206 CC er ein sera smartur bilur, sum fæst í fleiri nútímans litum, sum passa væl saman vi› introkkinum. Hetta er ein bilur sum hev›i hóska væl til okkara ve›urlag, har man hev›i ein smartan coupé at koyra vi› alt ári›, og lætt er at leggja taki› í vi›førisrúmi› ein gó›an summardag.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Peugeot 206 CC er ein 2+2 bilur, her er hann sum coupé

N‡ggjur Ford Fiesta um eitt ár

BILAR
Magnus Gunnarsson

Eftir ætlan skuldi ein n‡ggjur Ford Fiesta koma á markna›in á sumri 2002, men hann er nú framskunda›ur til fyri jól í 2001.

3 syl. diesel

Bilurin líkist nógv Ford Focus, og er nakrar sentimetrar størri enn núverandi Fiesta. Eins og Focus skal Fiesta eisini fáast vi› elektronisku stabilitet skipanini, ESP, sum standard. Ætlanin er eisini at Fiesta skal fáast vi› einum n‡ggjum 1,1 litur dieselmotori vi› trimum sylindarum.

Fiesta og Ka

Ford væntar at spara eini 10 milliardir krónur vi› at sameina Fiesta og tann minna Ford Ka, tá Fiesta kemur vi› 3 hur›um í 2002. Núverandi Ford Fiesta ver›ur eisini gjørdur sum Mazda 121, hvussu ver›ur vi› tí bilinum, vita vit ikki enn.

Kelda: FDM / Motor

N‡ggi Fiesta kemur fyrst í eini útgávu vi› 5 hur›um. Í 2002 kemur hann vi› 3 hur›um, sum samstundis ver›ur avloysari hjá Ford Ka.

ÚT AT KOYRA

VW Passat
– ein succes í n‡ggjari útgávu

Modelli› er ikki broytt so nógv. Forlyktirnar eru n‡ggjar vi› klárum glasi, kølaragittari vi› kromrammu er n‡tt
Mynd: Jens K. Vang

BILAR
Magnus Gunnarsson

Sí›an seinasti VW Passat kom á markna›in fyri gó›um f‡ra árum sí›an, hevur bilurin veri› so væl móttikin, at verksmi›jan hevur havt trupult vi› at klára eftirspurningin. Nú kemur Passat'urin í eini n‡ggjari útgávu.

Karossarí› munandi styrkt

Modelli› er ikki broytt so nógv. Forlyktirnar eru n‡ggjar vi› klárum glasi, kølaragittari vi› kromrammu er n‡tt, eins og n‡ggjar baklyktir og a›rar smærri broytingar. Fleiri smærri og størri ábøtur, sum til dømis at karossarí› er munandi styrkt. Laser-sveisingar eru komnar í sta›in fyri punktsveisingar, eins og hur›arnar eru styrktar.

Trygdin betri

Úrsliti› av øllum broytingunum er, at bilurin er heilt annarlei›is at koyra, ristingar í karrossaríinum eru so gott sum burtur. Hetta ger eisini at ljó›doyvingin, i› frammanundan var gó›, er betra› munandi. Vi› ta› at bilurin er stúttari, eru koyrieginleikarnir nógv betri. Trygdin er eisini munandi betri, bæ›i vi› ein samanstoyt frá sí›uni og frontalt. Umframt dupultan airbag, eru eisini sí›uairbag og trygdargardinur í sí›unum.

Comfortline, Trendline og Highline

Innan er á sama hátt, vi› n‡ggjum instrumentum, n‡ggj setur vi› betri tilfari. Standardútger›in er ikki vor›in minni í n‡ggju útgávuni, so sum aircoditíon, el- sí›uspegl vi› varma, el-rútar framman, koyritelda, tjóvaríalarmur, fjar›st‡rt sentrallás. Passat fæst nú í trimum høvu›s-útgávum, Comfortline, Trendline og Highline. Annars er møguleiki fyri at fáa bilin skræddaraseyma›an eftir egnum ynski.

5 bensin og 3 dieselmotorar

Átta motorar eru at velja ímillum, fimm bensin og tríggir dieselmotorar. Fyrst eru teir 4 syl. bensinmotorarnir 1,6 litur/l12 hk. 2,0 litur/115 hk. 1,8T/150 hk. sí›an ein 2,3 litur V5/170 hk og ein 2.8 litur V6 4Motion / 193 hk. Sí›an eru turbodiesel motorarnir 1,9 TDI / 100 hk. 1,9 TDI / 130 hk. og 2.5 TDI V6 / 150 hk. Allir motorarnir lúka tey strongu ES krøvini til dálking av umhvørvinum.

Innan eru n‡ggj instrument, og setrini eru gjørd úr betri tilfari

Aftan eru n‡ggjar baklyktir og a›rar smærri broytingar
Mynd: Jens K. Vang

VW Passat 1,9 TDI

Motorurin	4 syl. 1,9 TDI 101 hk Turbodiesel
0-100 km/t	12,7 sek.
Oljun‡tsla	18,2 km/l
Dekkstødd	195/65-15
Stødd og vekt	
Longd	470,3 cm
Breidd	174,6 cm
Hædd	146,2 cm
Eginvekt	1325-1425 kg.
Totalvekt	1950 kg
Prísur	kr. 243.000,-
Søluumbo›	Bilasølan v/Øssur Johannesen P/f Vegurin Langi FO-100 Hoyvík Tlf. 315354